# AGANEVNDIN

**KÆRA 9/2014**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Giza/Hoyvík kærir Víking fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 13.09.2014 | Aganevndin móttikið kæru: 19. september 2014 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna, Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna og Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi.

## 1. Úrskurður

Sambært grein 10 í Agareglugerðini fær Giza/Hoyvík ikki viðhaldi í kæruni um, at Víkingur nýtti ólogligan leikara í dystinum millum Giza/Hoyvík og Víking tann 13. september 2014.

## 2. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

Giza/Hoyvík hevur kært Víking fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum Giza/Hoyvík og Víking tann 13. september 2014 í 2. deild hjá monnum.

Í kæruni vísir Giza/Hoyvík á, at Víkingur hevur nýtt ein ólógligan leikara í dystinum tann 13. september 2014, og at talan er um leikaran Tórhall Eliassen, sum hevur fingið 3 gul kort í 2. deild í ár, og sum ikki hevur sitið yvir gulu kortini.

Víkingur er hoyrt í málinum og hevur svarað FSF, at leikarin skuldi sita yvir dystin hjá Víkingi í 2. deild móti B71 tann 6. september, men av misgávum var tað ikki gjørt. Hóast hetta, so meta teir ikki, at leikarin leikti ólógliga móti Giza/Hoyvík tann 13. september 2014, tí at tá leikari skal sita yvir leikbann í fyrstkomandi dysti og Tórhallur av misgávum ikki gjørdi tað í 14. umfari, tá hann skuldi havt gjørt tað, so metir Víkingur at leikarin kann leika lógliga í 15. umfari móti Giza/Hoyvík.

## 3. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 4. Fakta í málinum

Tann 13. september 2014 varð dystur leiktur millum Giza/Hoyvík og Víking í 2. deild hjá monnum.

Leikarin Tórhallur Eliassen leikti fyri Giza/Hoyvík í omanfyri nevnda dysti.

Sambært upplýsingum frá FSF umsitingini, fekk nevndi leikari sítt triðja gula kort í 2. deild hjá

monnum tann 23. august 2014, og leikti hann tískil ólógliga í 2. deild hjá monnum tann 6. september 2014, tá Víkingur og B71 leiktu dyst.

**5. Lógarverkið**

**Kappingarreglur fyri Fótbólt**

§ 37, b. stk. 2.

Dómarin skal skrivliga boða Kappingarnevndini frá teimum ávaringum (gult kort) ið givnar verða.

Tá leikari hevur fingið 3 gul kort, fær hann 1 dag leikbann

Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort, fær hann 1 dag leikbann

Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort, fær hann tveir (2) dagar leikbann. Hvørt gult kort givið eftir hetta, gevur leikbann í ein (1) dag.

Leikbann eftir hesi reglu eru galdandi frá fyrst komandi leikdegi.

**Agareglugerðin**

§ 10
Kæra um brot á tær í grein 2 nevndu lógir og reglur og avgerðir hjá undirnevndum FSF's skal sendast aganevndini innan 5 dagar eftir at brotið er framt, ella 5 dagar eftir at úrskurðurin er komin til kunnleika hjá viðkomandi persóni ella felag.

Við kæruni skulu fylgja kr. 1.000,00, sum verða afturgoldnar, um kæran vinnur sømdir.

**6. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at aðalreglan í grein 10 í Agareglugerðini greitt ásetir eina 5 daga freist fyri kærir til nevndina.

Aganevndin kann somuleiðis staðfesta, at omanfyri nevndi leikari fekk sítt triðja gula kort tann 23. august 2014 og tískil leikti ólógliga í dysti tann 6. september. Hesin dystur er ikki kærdur innan ásettu freist í grein 10 í Agareglugerðini og ger Aganevndin sostatt ikki meira við hetta mál.

**7. Niðurstøða**

Leikarin Tórhallur Eliasen leikti lógliga í dystinum millum Giza/Hoyvík og Víking í 2. deild hjá monnum tann 13. september 2014.

**8. Úrskurður**

Sambært grein 10 í Agareglugerðini fær Giza/Hoyvík ikki viðhaldi í kæruni um, at Víkingur nýtti ólogligan leikara í dystinum millum Giza/Hoyvík og Víking tann 13. september 2014.

**9. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**10. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 30. september 2014**

Ingunn Ó. Eiriksdóttir, forkvinna